


Eykauppgávur

Navn: _____ flokkur: ____

• Hvør var Adolf Hitler?
Lýs Hitler sum persón. Brúka greinina niðanfyri og tað, tú annars veitst um hann:

_____

_____

_____



_____



Higartil ókend skjøl avdúka, at týski nazi-førarin Adolf Hitler ikki var tann krígshetjan undir fyrra heimsbardaga, hann segði seg vera. Tvørturímoti hildu hinir vápnabrøðurnir í herinum lítið um hann og høvdu javnan hug at arga hann

Adolf Hitler (uttast vinstrumegin í fremru rað) saman við vápnabrøðrum. Nýggj skjøl avdúka, at Hitler ikki var tann krígshetjan, hann sjálvur breggjaði av. Tvørturímóti varð hann roknaður sum eitt »baklinju-svín«, ið helt seg langt burtur haðan, tað leikaði harðast á, og hann varð illa happaður

Mynd: Hultn Archive/Getty Images

Ein skotskur søgufrøðingur sigur seg vera komnan fram á higartil ókend skjøl, sum avdúka, at Hitler undir fyrra veraldarbardaga ikki var tann krígshetjan, hann sjálvur breggjaði av.

Thomas Weber á Aberdeen University hevur m.a. funnið brøv frá lagsbrøðrum í herinum, sum prógva, at Hitler varð roknaður sum eitt »baklinju-svín«, ið helt seg langt burtur haðan, tað leikaði harðast á.

Sambært skjølunum var Hitler egin og ofta happaður. Hann varð m.a argaður við, at hann hevði doyð í hungri, um hann endaði á einum niðursjóðingarvirki, tí hann dugdi ikki at lata eitt matblikk upp.

Nýggju upplýsingarnar avlíva páhald í fleiri ævisøgum um, at Hitler var djarvur hermaður.

(BBC)



• Hvussu brýtur Nasistaflokkurin mannarættindi ST´s?

Brot úr 2. grein í Heimsyvirlýsing ST´s um mannarættindi:

2. grein

Øll hava krav um rættindi og frælsi…… uttan mun til ættarslag, húðarlit, kyn, mál, átrúnað, politiska ella aðra sannføring, tjóðskaparligan ella samfelagsligan uppruna, ognarviðurskifti, føðing ella aðra støðu.

• Loys orðagátuna:



÷ hól



÷ ða



÷ nsur




÷ ólur + j



+ a

Loysn: _____

- **Ger hugarok**


fangalegur
Daccau
hjálparfólk hjá Hitleri
Jødatýningin
øvundsjúka
jødahatrið